# Byrjan av virksemi




SPEKT | statsaut. revisorar

nov. 2008

# Byrjan av virksemi

*Heimasíða: www.spekt.fo*

# Stovnan av egnum felag

1 Inngangur . . . . . . . . . . 4

2 Áðrenn farið verður til verka . . . . . . . . . . 5
2.1 Fyrimunir og vansar . . . . . . . . . . 5
2.2 Umhugsa samstarv . . . . . . . . . . 5
2.3 Eingin avgerðandi forðing. . . . . . . . . . 6
2.4 Lýsing av ætlaðu fyritøkuni. . . . . . . . . . 6
2.5 Fígging . . . . . . . . . . 6
2.6 Vandi fyri at missa pening . . . . . . . . . . 7
2.7 Persónligt felag (firma) ella smápartafelag/partafelag . . . . . . 8
2.8 Munur millum vinnulig feløg og frítíðarítriv . . . . . . . . . . 11

3 Farið verður til verka. . . . . . . . . . 12
3.1 Samstarvsavtala . . . . . . . . . . 12
3.2 Skráseting av felag . . . . . . . . . . 12
3.3 Loyvi . . . . . . . . . . 12
3.4 Verja av framleiðslu/sølu . . . . . . . . . . 12
3.5 Tryggingarviðurskifti . . . . . . . . . . 12
3.6 Mvg. . . . . . . . . . . 13
3.7 Roknskaparskylda . . . . . . . . . . 13
3.8 Grannskoðan . . . . . . . . . . 13
3.9 Fíggjarstýring og innanhýsis mannagongdir. . . . . . . . . . 14

4 Samanumtikið. . . . . . . . . . 16

# 1 Inngangur

Í sambandi við stovnan av egnum felag eru nógvir spurningar at taka støðu til og nógv viðurskifti at fáa greiðu á.

Niðanfyri hava vit í stuttum lýst nøkur av teimum mest týðandi viðurskiftunum hesum viðvíkjandi; talan er ikki um eina fullfíggjaða gjøgnumgongd.

# 2 Áðrenn farið verður til verka

## 2.1 Fyrimunir og vansar

Orsøkirnar kunnu verða nógvar til at stovna egið felag. Av orsøkum, ið tala fyri hesum, kunnu nevnast:

- ynski um at ráða sær sjálvum
- dreymur um at skapa nakað ávíst
- dreymur um at vinna nógvan pening

Tó skal havast í huga, at stovnan av egnum felag ofta hevur við sær:

- longri arbeiðstíðir
- størri ábyrgd
- broyttar arbeiðsuppgávur
- upptøku av skuld og vanda fyri at missa pening
- lønarniðurgongd í eina tíð

Umframt at meta um fyrimunir og vansar skal íverksetarin eisini meta um, hvørt hann er tann rætti persónurin til at fara undir egna fyritøku. Í hesum sambandi verður m.a. hugsað um persónligar og fakligar eginleikar og fíggjarligar møguleikar.

## 2.2 Umhugsa samstarv

Tað kann verða torført einsamallur at taka sær av øllum uppgávum, sum skulu avgreiðast í sambandi við at farið verður til verka. Tí verður mælt til, at íverksetarar bæði í sambandi við stovnan og eftirfylgjandi við jøvnum millumbili umhugsa møguleikan fyri at taka upp samstarv við persónar ella feløg.

Hetta kann t.d. gerast við, at ein ella fleiri persónar gerast partar av verkætlanini. Við hesum fær íverksetarin onkran at „sparra“ við og eitt hóskandi arbeiðsbýti kann gerast.

Ein annar møguleiki er, at íverksetarin ger eitt samstarv við eitt kent felag, soleiðis at teir saman fara í gongd við verkætlanina. Hetta lættir um bæði marknaðarføringina og nógvar umsitingarligar uppgávur.

## 2.3 Eingin avgerðandi forðing

Fyrst eigur íverksetarin at kanna eftir, um møguleiki er fyri at fara undir ætlaða virksemið. Í hesum sambandi má m.a. tryggjast:

- at hann ikki hevur skrivað undir upp á, ikki at fara undir virksemi av hesum slagi (kappingarklausul)
- at virksemið ikki er t.d. patentvart
- at tað er sannlíkt, at hann fær øll neyðug loyvi og kravdar góðkenningar

## 2.4 Lýsing av ætlaðu fyritøkuni

Mælt verður til, at ein lýsing av fyritøkuni verður gjørd, áðrenn byrjað verður.

Lýsingin skal fyrst og fremst lýsa, um verkætlanin er burðardygg. Harafturat kann lýsingin nýtast í sambandi við útvegan av neyðugari fígging, sí niðanfyri undir petti 2.5.

Hvussu útgreinað lýsingin skal verða, er treytað av hvussu víttfevnandi ætlaða virksemið er. Lýsingin kann m.a. fevna um upplýsingar um:

- íverksetaran
- hvat virksemið fevnir um
- inntøkumøguleikar
- vakstrarmøguleikar
- íløgutørv
- fíggingartørv
- týðandi fyritreytir og vandamál
- fíggjarætlan (rakstur, fíggjarstøðu og gjaldføri)

## 2.5 Fígging

Áðrenn byrjað verður, er týðandi at útvega neyðuga fígging. Tá tosað verður um fígging, verður hugsað um eginpening og um lántøku.

Tað er ikki gjørligt treytaleyst at siga, hvussu stórur partur av fíggingini eigur at verða eginpeningur. Krøvini til eginpening eru størri í vinnugreinum, har úrslitini broytast lutfalsliga nógv, enn í greinum har úrslitini eru lutfalsliga jøvn.

Alt eftir hvørja vinnugrein talan er um, eigur at verða miðjað ímóti, at eginpeningurin fevnir um í minsta lagi 20-50% av samlaðu fíggingini.

Lánifíggingin kann býtast í tvey sløg:

- Íløgulán: Fyri at byrja virksemið er ofta neyðugt at gera íløgur í ymsa útgerð (t.d. maskinur og bygningar). Íløgur verða vanliga fíggjaðar við láni, sum skal rindast aftur yvir eitt ávíst áramál.
- Rakstrarkredittur: Í flestu førum skal felagið rinda framleiðslu- og aðrar rakstrarútreiðslur, áðrenn felagið fær gjalding fyri sølu/tænastu. Raksturin verður vanliga fíggjaður við, at felagið fær ein kassakreditt.

Tørvurin fyri íløgufígging kann minkast við, at felagið leigar útgerð í staðin fyri at keypa útgerð.

Fíggingartørvurin kann eisini minkast við, at felagið fær stuðul til ætlaða virksemið. Mælt verður til, at stuðulsmøguleikarnir verða kannaðir.

## 2.6 Vandi fyri at missa pening

Við stovnan av egnum felag er í flestu førum ein ávísur vandi fyri, at eigarin missir pening, um felagið gongur illa.

Eigarin eigur tí at umhugsa, hvussu stóra upphædd hann í mesta lagi er sinnaður at missa, og at taka neyðug stig til tess at tryggja, at avleiðingarnar av møguligum missi ikki gerast størri enn neyðugt.

Tað eru fleiri møguleikar fyri at seta eitt hægstamark fyri, hvussu nógv eigarin kann missa, eins og ein kann minka um avleiðingarnar av møguligum missi.

Missurin kann avmarkast við, at virksemið t.d. verður rikið í einum smápartafelag/partafelag. Tá er møguleiki fyri, við avmarkaðum persónligum trygdum, at áseta mesta mark fyri møguligum missi. Verður virksemið hinvegin rikið í persónligum felag, heftir eigarin fult út fyri øllum tapum.

Avleiðingar av møguligum missi kunnu avmarkast við t.d. at flyta tær mest týðandi ognirnar til møguligan hjúnafelaga, áðrenn virksemið byrjar. Sum útgangsstøði hefta hjúnafelagar ikki fyri skuld hjá hvørjum øðrum.

## 2.7 Persónligt felag (firma) ella smápartafelag/partafelag

Við stovnan av egnum felag, skal avgerð takast um slag av felag. Tey vanligastu sløgini eru persónlig feløg (firma) og smá- og partafeløg:

### Persónligt felag og íognarfelag

Høvuðsmunurin millum eitt persónligt felag og eitt íognarfelag er, at persónlig feløg hava ein eigara, meðan íognarfeløg hava fleiri eigarar.

Persónligt felag er tann einfaldasti og mest nýtti hátturin fyri smá og/ella nýggj feløg. Tað eru eingi kapitalkrøv, men hinvegin heftir eigarin við øllum tí, sum hann eigur. Í íognarfeløgum heftir hvør eigari við øllum tí, sum hann eigur, fyri allari skuld felagsins. Persónlig feløg og íognarfeløg skulu skrásetast hjá TAKS.

Skattaroknskapur skal gerast, og skattliga úrslitið hjá felagnum verður býtt millum eigararnar og tikið við í teirra persónligu sjálvuppgávum.

Tað er ikki krav, at ársroknskapurin skal grannskoðast, og ársroknskapurin verður ikki almannakunngjørdur.

### Smápartafelag og partafelag

Høvuðsmunurin millum smápartafeløg og partafeløg er kravið til partapening. Minstakravið til partapening í einum smápartafelag er 125.000 kr., meðan kravið til partapening í einum partafelag er 500.000 kr. Partapeningurin kann vera reiður peningur ella aðrar ognir, so sum bygningar ella maskinur. Eigarin heftir bert fyri inngoldna partapeninginum. Felagið skal skrásetast hjá Skráseting Føroya og TAKS.

Ársroknskapurin skal sum høvuðsregla grannskoðast av løggildugum ella skrásettum grannskoðara sí petti 3.8, og latast inn til Skráseting Føroya, har hann verður almannakunngjørdur.

Smáparta- og partafeløg lata inn egna sjálvuppgávu til TAKS, og skattliga yvirskotið verður skattað við 18%. Verður yvirskotið útlutað sum vinningsbýti, skal eigarin (persónur) rindað 35% í vinningsbýtisskatti.

- - -

Tað er ikki møguligt treytaleyst at siga, nær tað er fyrimunur at velja firma/íognarfelag og nær tað er fyrimunur at velja smáparta-/partafelag. Niðanfyri eru tveir týðandi spurningar í hesum sambandi lýstir:

### Hvussu stórur er váðin fyri eigaran ?

Sum nevnt omanfyri hefta eigararnir fult út fyri skuld hjá persónliga riknum feløgum, meðan hetta sum útgangsstøði ikki er galdandi fyri smáparta- og partafeløg. Lángevarar krevja tó ofta persónliga trygd í sambandi við, at smáparta- og partafeløg fáa lán.

Í byrjanini er virksemið ofta avmarkað og vandin fyri at missa týðandi upphæddir ikki stórur. So hvørt sum virksemið veksur, økist vandin fyri at missa týðandi upphæddir.

Økti vandin fyri tapum er ein av orsøkunum til, at flestu persónliga riknu feløgini verða løgd um til smápartafeløg, tá virksemið økist. Nær hetta skal gerast, er ikki nakað greitt svar upp á.

### Hvussu eru skattaviðurskiftini ?

Yvirskot í persónliga riknum feløgum verður skattað hjá eigaranum, tvs. við einum marginalskattaprosenti, ið vanliga er millum 40-55%. Yvirskot hjá smáparta- og partafeløgum - eftir at eigarin hevur fingið sína løn - verður skattað við 18%.

Nýstovnað feløg hava ofta hall fyrstu tíðina. Verður virksemið rikið í persónligum felag kann hallið dragast frá í aðrari persónligari inntøku, sí niðanfyri. Verður virksemið hinvegin rikið í smápartafelag/partafelag, kann hallið ikki dragast frá í persónligum inntøkum. Hetta er ein orsøk til, at tað í byrjanini ofta loysir seg at reka virksemið í persónligum felag. Tó kunnu hall í smápartafelag/partafelag dragast frá skattskyldugu inntøkuni í felagnum, um hetta seinni gevur yvirskot.

Um virksemið kastar týðandi upphæddir av sær, og harvið fær eitt yvirskot, ið er hægri enn tað sum eigarin hevur brúk fyri í løn, kann tað verða ein fyrimunur at leggja raksturin í eitt smápartafelag/partafelag. Møguleiki er tá fyri at spara upp í smápartafelagnum/partafelagnum til ein lágan skattasats.

Sum dømi kann nevnast eitt felag, ið gevur eitt yvirskot upp á 400.000 kr. áðrenn løn til eigaran. Eigarin býr í einari kommunu við einum skattaprosenti upp á 19%, hevur onga aðra inntøku og ongar frádráttir. Eigarin hevur eina privatnýtslu upp á 160.000 kr. eftir skatt.

Skattaviðurskifti, um felagið verður rikið sum persónligt felag:

| | |
|---|---|
| Skattskyldug inntøka hjá eigaranum | 400.000 |
| Skattur | -160.000 |
| Nettoinntøka | 240.000 |
| Privatnýtsla | -160.000 |
| | |
| Uppsparing hjá eigaranum | 80.000 |

Skattaviðurskifti, um felagið verður rikið sum smápartafelag/partafelag:

| Eigarin: | | Smápartafelag/ partafelag: | |
|---|---|---|---|
| Inntøka | 240.000 | Úrslit áðrenn løn til eigara | 400.000 |
| Skattur | -80.000 | Løn til eigara | -240.000 |
| Nettoinntøka | 160.000 | Skattskyldug inntøka | 160.000 |
| Privatnýtsla | -160.000 | Skattur, 18% | -28.800 |
| Uppsparing hjá eigaranum | 0 | Uppsparing í felagnum | 131.200 |

Uppgerðin vísir, at um felagið kastar meira av sær enn eigarin hevur brúk fyri, er møguleiki fyri at spara munandi meira upp í einum smápartafelag/partafelag, enn um felagið verður rikið í persónligum felag. Um yvirskotið verður útlutað sum vinningsbýti, er munurin ikki so stórur, tí tá skal uppsparingin í felagnum

skattast við 35%. Hinvegin er møguligt at nýta uppsparingina í felagnum til t.d. íløgur.

## 2.8 Munur millum vinnulig feløg og frítíðarítriv

Í skatta- og mvg-høpi verður skilt millum vinnulig feløg og frítíðarítriv.

Tað er einki fast mark millum vinnulig feløg og frítíðarítriv, og tí er neyðugt at gera eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Eitt høvuðseyðkenni fyri vinnulig feløg er, at tey hava sum endamál at geva peningaligan vinning.

Sum dømi kunnu nevnast:

– Við keyp av einum báti skal støða takast til, um báturin er ætlaður til vinnuligan útróður ella um talan er um ein stuttleikabát.
– Við keyp av einum traktori skal støða takast til, um traktorurin er ætlaður til vinnuligt seyðahald ella um seyðahaldið bert er eitt frítíðarítriv.

Skattliga hevur avgerðin serliga týdning fyri viðgerðina av møguligum halli. Skattligt hall kann bert dragast frá í aðrari inntøku, um talan er um vinnuligt virksemi, og ikki um talan er um frítíðarítriv. Hinvegin skal eitt møguligt yvirskot skattast, óansæð um talan er um vinnuligt felag ella frítíðarítriv.

Viðvíkjandi mvg er høvuðsreglan tann, at vinnulig feløg við eini sølu upp á meira enn 20.000 kr. skulu mvg-skrásetast. Er talan hinvegin um frítíðarítriv, skal felagið ikki skrásetast, óansæð hvussu stór sølan er. Hetta merkir m.a., at tá talan er um frítíðarítriv, er ikki møguligt at fáa endurgoldið íløgu-mvg.

# 3 Farið verður til verka

## 3.1 Samstarvsavtala

Eru fleiri eigarar í felagnum, verður mælt til, at gjørdur verður ein sáttmáli, har nærri verður ásett, hvussu teirra framtíðar samstarv skal fara fram.

## 3.2 Skráseting av felag

Øll vinnulig feløg skulu skrásetast hjá TAKS. Skrásetingin fer fram við at útfylla eitt oyðublað, sum fæst frá TAKS.

Smápartafeløg og partafeløg skulu harafturat skrásetast hjá Skráseting Føroya. Í hesum sambandi skulu ymisk skjøl gerast, so sum stovningarsamtykt, viðtøkur fyri felagið, starvsskipan fyri leiðslu og partabrævabók. Í flestu førum hjálpa sakførarar til við gerð av nevndu skjølum.

## 3.3 Loyvi

Umframt skráseting hjá TAKS og møguliga hjá Skráseting Føroya, krevst í nøkrum førum loyvi til at reka vinnuligt virksemi. M.a. skulu feløg, sum fara undir matvøruframleiðslu, góðkennast av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

## 3.4 Verja av framleiðslu/sølu

Íverksetarin eigur altíð at meta um, í hvønn mun tað er møguligt og/ella ynskiligt at verja framleiðsluna/søluna.

## 3.5 Tryggingarviðurskifti

Flestu feløg hava tørv á at tryggja seg móti skaðum av ymsum slag alt eftir vinnugrein. Íverksetarin eigur at taka støðu til, hvørjar tryggingar eru hóskandi, soleiðis at virkið er ráðiliga tryggjað.

## 3.6 Mvg

Flest øll vinnulig feløg skulu mvg-skrásetast og lata inn mvg-uppgerðir. Mvg-skráseting er ein partur av skrásetingini hjá TAKS.

Høvuðsreglan í mvg-lógini er, at feløg krevja inn sølu-mvg av vørum, sum tey selja og rinda keyps-mvg av vørum, sum tey keypa.

Havast skal í huga, at tað finnast týðandi undantøk til nevndu høvuðsreglu, og tí eiga feløg at seta seg væl inn í tær reglur, ið hava týdning fyri teirra virksemi.
Munurin millum innkravt sølu-mvg og goldið keyps-mvg verður sum høvuðsregla avroknaður til TAKS eina ferð um ársfjórðingin. Mvg-skrásett feløg fáa sendandi mvg-uppgerð frá TAKS.

## 3.7 Roknskaparskylda

Øll vinnulig feløg hava skyldu til at føra bókhald og gera roknskap. Bókhaldið skal førast leypandi og bókingarskjølini (fakturar, rokningar, lønarseðlar, kontuavrit v.m.) skulu goymast í minsta lagi í 5 ár.

Øll vinnulig feløg skulu senda skattaroknskap til TAKS.

Smápartafeløg og partafeløg skulu harafturat senda ársroknskap til Skráseting Føroya.

## 3.8 Grannskoðan

Sum høvuðsreglu, skulu ársroknskapir hjá smápartafeløgum og partafeløgum grannskoðast av løggildugum ella skrásettum grannskoðara. Tó kunnu heilt smá feløg (søla undir 1.500 tkr. og/ella ogn til samans undir 750 tkr.) í nógvum førum frávelja grannskoðan.

Tað er einki lógarkrav um grannskoðan av persónliga riknum feløgum (firma/íognarfelag).

## 3.9 Fíggjarstýring og innanhýsis mannagongdir

Øll feløg, óansæð støðd, hava brúk fyri fíggjarstýring og innanhýsis mannagongdum. Stór feløg krevja ofta meira víttfevnandi og neyva fíggjarstýring og innanhýsis mannagongdir enn smá feløg. Fíggjarstýring og innanhýsis mannagongdir skulu m.a. tryggja:

– At alt gongur rætt fyri seg.
  Her verður m.a. hugsað um, at felagið fær rætta gjalding fyri alla sølu, og at felagið bert rindar fyri góðkendar/móttiknar vørur og tænastur.

– At eigarin/leiðslan uttan stórvegis hóvasták kann fáa neyvar og viðkomandi upplýsingar um felagið.
  Upplýsingarnar skulu m.a. nýtast til at fylgja fíggjarligu gongdini hjá felagnum og í arbeiðinum at meta um, hvat best er at gera í framtíðini.

Hóskandi fíggjarstýring krevur í flestu førum:

– Eina hóskandi bókhalds-/roknskaparskipan. Hjá flestu feløgum er nóg mikið við smærri standardskipanum.

– At bókhaldið verður ført við jøvnum millumbilum, alt eftir støðd og tørvi. Umframt at bóka skjøl, skulu allar vanligar avstemmanir gerast, herundir av peningastovnum og kreditorum.

– Mannagongdir viðvíkjandi sølu og innkrevjing. Hesar skulu m.a. tryggja:
  • eina rætta prísáseting
  • eina hóskandi kredittmeting av kundum
  • at øll søla verður fakturerað
  • eina hóskandi innkrevjing av útistandandi peningi

– Mannagongdir viðvíkjandi keypi og útgjalding. Hesar skulu m.a. tryggja:
  • at felagið bert rindar fyri móttiknar vørur og tænastur
  • at felagið altíð hevur eina hóskandi goymslu

– Eina fíggjarætlan. Henda skal byggja á tær ætlanir, ið leiðslan hevur viðvíkjandi felagnum.

- At leypandi uppfylgingar verða gjørdar, har m.a. verður mett um, hvørt felagið er „á rættari kós“ ella um tillagingar skulu gerast. Mánaðar- ella kvartalsroknskapir samanbornir við fíggjarætlan kunnu vera eitt týðandi íkast til hesar metingar.

# 4 Samanumtikið

Omanfyri hava vit lýst nøkur av teimum mest týðandi viðurskiftunum havast skulu í huga, tá farið verður undir egið felag. Sum nevnt í innganginum er okkara lýsing ikki fullfíggjað.

Samanumtikið kann sigast, at íverksetarin eigur at fyrireika seg væl áðrenn virksemið byrjar. Harafturat kann sigast, at tað er lutfalsliga lætt at stovna egið felag, og at fyrisitingarliga arbeiðið í byrjanini, sum oftast er lutfalsliga lítið. So hvørt sum virksemið veksur, økist fyrisitingarliga arbeiðið.

Nógv virki byrja í smáum og verða tá rikin sum persónlig feløg. So hvørt sum tíðin líður, kann verða ynskiligt at broyta hetta til smá- ella partafelag.

Við stovnan av egnum felag gera í flestu førum ítøkilig viðurskifti seg galdandi, sum krevja persónliga ráðgeving. Vit í SPEKT hava hollar royndir hesum viðvíkjandi og bjóða okkum fegin fram at ráðgeva.

SPEKT | statsaut. revisorar